## Kanska gomul mina

Tað var kanska ein mina frá Koreakrígnum, sum søkti tað suðurkoreanska herskipið, sum fór til botns nærhendis sjómarkinum millum Suðurkorea og Norðurkorea seinasta fríggjadag. Tað sigur suðurkoreanska verjumálaráðið, sum tó leggur afturat, at eitt brek við onkrum av vápnunum umborð kann eisini hava elvt til spreinging og søkt skipið. Verjumálaráðið heldur hinvegin ikki, at Norðurkorea hevði nakað við tilburðin at gera, men tann møguleikin verður kortini ikki útilokaður. 104 mans vóru við skipinum, og 46 teirra eru ikki komnir afturíaftur.



## Tímar við skíggjan

Børn sita alt ov nógv framman fyri einum sjónvarpsskíggja ella einum telduskíggja. Ein stór kanning vísir, at næstan ein triðingur av heimsins børnum sita tríggjar tímar ella longri við sjónvarpið ella telduna um dagin. ST-stovnurin WHO hevur gjørt kanningina, og næstan 73.000 børn millum 13 og 15 ár úr 34 londum vóru við í henni. WHO kannaði eisini, hvussu nógv børnini røra seg. Sagt verður, at børn skulu røra seg minst ein tíma um dagin afturat fimleikinum í skúlanum, men sambært kanningini eru tað bara 25 prosent av dreingjunum og 15 prosent av gentunum, sum røkka tí málinum.

# Ótangar rasera á Sandoynni

**Ellivu rútar vórðu knústir í einum húsum, sum stóðu tóm á Sandi. Innan eru húsini illa farin**

HERVERK
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Flestu rútarnir í húsunum vórðu knústir, so óveðrið slapp rættiliga at gera um seg inni*
*Mynd: Sandportal*

Í longri tíð hava herverk verið framd ymsa staðni á Sandoynni, og ein familja, sum veruliga hevur kent sviðan av hesum, eru hjúnini Anna og Eyðfinnur Stórá í Skopun. So ofta er herverk framt móti ognum teirra, at Eyðfinnur Stórá ivast ikki longur í, at tað man vera persónligt.

- Tað byrjaði í jólavikuni við, at herverk varð gjørt móti bilinum hjá mær, og um nýggjársleitið varð postkassin sprongdur í luftina, sigur hann.

Nakað herfyri keyptu tey ein brúktan komfýr, sum skuldi setast í barnaheimið hjá Onnu á Sandi. Komfýrurin stóð í nakrar dagar innpakkaður uttan fyri hús teirra í Skopun.

- Tíðliga sunnumorgunin í hinari vikuni hava teir verið og koppað og brotið komfýrin, sigur Eyðfinnur Stórá.

Eyðfinnur og Anna Stórá eiga barnaheim hennara á Sandi. Húsini standa undir Skarði.

Leygarmorgunin ringdi ein granni á Sandi og boðaði frá, at ein rútur í húsunum var brotin. Eg fór heim á Sand at hyggja, og tá taldi eg ellivu brotnar rútar, sigur Eyðfinnur Stórá.

Inni í húsunum eru nógvir gamlir lutir, og Eyðfinnur Stórá ber ótta fyri, at inni eru skaðar hendir, tí ættin hevur ligið beint á. Hann hevur ikki viljað farið inn, fyrrr enn politiið hevur verið og hugt at húsunum.

Fyribils er bara sligið upp fyri brotnu rútarnar.

Eyðfinnur Stórá er ikki greiður yvir, hvørjir ótangarnir eru, men hann gitir, at tað eru ung fólk, sum einki hava at taka sær til.

Tað eru ikki bara tey, sum hava verið offur fyri herverki. Ein dag var ein bátur rendur á sjógv.

- Vit vita, sum nevnt ikki, hvør hevur gjørt alt hetta, og sjálvt um onkur veit, siga tey tað ikki, sigur Eyðfinnur Stórá.

Tað eydnaðist ikki í dag at fáa at vita frá politinum í Sandoynni, um nakað nýtt er í málinum.

# Byggja eldravinarlig hús í Trongisvági

**Sp/f Roest fer um einar tvær vikur undir eina serliga útstykking á Heiðatrøðni. Har verða bygd hús, sum eldri fólk og brekað kunnu búgva í**

HÚSABYGGING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í hesum døgum eru ikki nógv, sum byggja sethús, men um tvær vikur fer sp/f Roest at grava út fyri fyrstu húsunum, sum felagið fer at byggja á Heiðatrøðni í Trongisvági.

Heiðatrøðin liggur beint við Føroya Keypssamtøku. Kommunan keypti trøðna at stykkja út til sethús, og ein part av hesi trøð hevur SP/F keypt.

- Vit hava fingið fígging, og alt skuldi verið klárt, so vit kunnu fara til verka. Okkum vantar bara eina undirskrift, sum vit vita, at vit fáa, sigur Sven Roest, stjóri í sp/f Roest.

Húsini verða sambygd tvey og tvey, og í fyrsta byggistigi verða fimm ella seks hús. Samanlagt skulu byggjast 18-20 hús á trøðni.

- Vit byggja húsini soleiðis, at eldri fólk og brekað kunnu búgva har, eitt nú verða ongar gáttir, køkurin innrættaður við atliti til tey fólkini, men selja ikki íbúðirnar sum eldraíbúðir, tí vit hava onga hóming av, hvussu stórur tørvurin er á slíkum bústøðum í kommununi.

Húsini verða 86 fermetrar, og tá ið tey verða seld, verða tey fullkomiliga liðug.

Sven Roest nevnir húsini fyri lágorkuhús og umhvørvisvinarlig hús, tí tey skulu hava flagtekju og hitapumpu.

Arkitekturin Albert Isfeld hevur teknað.

Hann sigur, at onkrir seriøsir fyrispurningar eru komnir til húsini.

Ætlanin er, at tey fyrstu tvey húsini skulu verða liðug í august, og tá er ætlanin at hava opið hús saman við arkitekti, leverandørum og øðrum.



Kostnaðurin fyri tey fyrstu húsini verður væntandi stívliga ein millión krónur.

Sven Roest heldur, at teir eru væl fyri at fara undir slíka byggiætlan, tí annar sonur hansara er múrari og hin snikkari. Annars er ætlanin bara at hava lokalar arbeiðstakarar.